## Halla innkomin í býráðið

Á fundi hóskvøldið tók Halla Samuelsen (*myndin*) sætið sum býráðslimur fyri Katrin Dahl Jakobsen úr javnaðarflokkinum. Katrin hevði boðað frá, at henni brast frá at røkja hetta starvið í eitt tíðarskeið longri enn 14 dagar, og ynskti tí at næsta valevni á listanum kom inn. Sostatt sleppur hon nú at royna seg sum býráðspolitikkara í eina tíð framyvir.



## Sambandið tosar um kristiliga mentanarstøðið

Í fleiri ár hevur verið siður hjá Sambandsflokkinum at hava ein sonevndan Heystarfund. Soleiðis verður eisini í ár, tí leygardagin 10. november verður hesin fundurin hildin á Hotel Hafnia. Evnið fyri fundin er Kristiliga Mentanarstøðið. Hetta verður gjørt út frá stevnuskránni, har sagt verður, at Sambandsflokkurin vil reka ein framtaksfúsan politikk á kristiligum mentanarstøði.Hvat hetta merkir, verður nærri greitt á fundinum sum byrjar kl. 10.



*Lívdin fer í næstum undir nýggja samkomubygning sín*

*Mynd: Livdin.fo*

# 2 mió kr. til nýggjan samkomubygning

**Samkoman Lívdin í Hoyvík arbeiðir í løtuni við at útvega sær nýggjan og stórfingnan samkomubygning í Hoyvík**

Líka síðani samkoman byrjaði at halda regluliga møti í august mánaði 2001, hevur hugurin staðið til at fáa sær ein bygning til tað víttfevnda virksemið í samkomuni.

Møtini verða í dag í stóran mun hildin í Hoyvíkar skúla, men nú stendur eitt størri mál fyri framman – at fáa ein bygning á økið, sum longu er planerað og byggibúgvið framvið Vegnum Langa.

Við byrjanina av hesum árinum setti samkoman sær enn eitt mál, - at hava 1,5 mió kr. á bók, áðrenn árið var liðið. Tá hetta málið var rokkið, skuldu tey av álvara fara undir byggingina.

Nú, ið gjørt varð upp fyri fyrstu sjey mánaðirnar av árinum, er greitt at samkoman longu hevur rokkið hesum málinum – og meiri aftrat!

Samkoman fekk nevniliga í summar eina rættiliga stóra gávu til byggigrunnin. Í dag standa 2 mió krónur í grunninum.

- Vit frøast um hesa gávuna, og um at Harrin signar arbeiðið við at útvega samkomuni ein nýggjan bygning, verður sagt haðani.

Samkoman hevur ein byggibólk, sum í løtuni arbeiðir við myndugleikaprosjektinum. Sum skilst gongur tað arbeiðið væl, og tí verður sæð fram til dagin, tá byggiarbeiðið av álvara kann byrja.

**sb.**

## »Tak meg við« inn í bíbliusøguna

**Heimamissiónsforlagið hevur givið úr eina forvitnisliga tasku, sum bæði inniheldur spennandi uppgávur og tusjir.**




Taskan við heitinum "Tak meg við" inniheldur ikki færri enn seks smærri bøkur við ymiskum uppgávum til tey 7 til 10 ára gomlu.

Í fyrstu syftu er talan um fýra bøkur við bíbilskum myndum, har ymiskar uppgávur skulu loyst. Í øðrum lagi er talan um tvær bøkur við bíbliusøgum um Móses og Dávid.

Hesar báðar bøkurnar eru skipaðar eftir sum skava-og-vinn-bøkur, har hvør síða hevur eina ósjónliga mynd. Fyrst tá hesin punturin verður skavaður við eini mynt kemur heildarmyndin fram.

Taskan er væl egnað til skúlabrúks og aðra undirvísing, tí væl ber til at taka hana við sær onkustaðni, um børnini ynskja okkurt at stuttleika sær við og samstundis loysa bíbliuuppgávur.

Kostnaðurin fyri taskuna er 95 kr. Hon fæst hjá Heimamissiónsforlagnum í Nesvík og í bókhandlunum kring landið.

**sb.**

# Kend donsk kórkvinna í Nesvík




*Maud Kofoed bæði syngur og spælir saxofon*

Í gjárkvøldið byrjaði árliga sangskeiðið hjá Heimamissiónini. Omanfyri 100 fólk eru teknað til skeiðið, sum varir alla hesa komandi vikuna.

Á skeiðnum verður sungið nógv, eins og luttakararnir kunnu velja seg inn á ymiskar áhugatímar sum allir á einhvønn hátt hava við sang og sangarbeiðið at gera.

Serliga skrá er fyri børnini. Tey verða ansað og sleppa haraftrat at venja nakrar sangir saman.

Kórleiðari í ár er Maud Kofoed, sum annars er kórleiðari í danska gospelkórinum Vocation.

Maud skrivar sjálv sangir og er haraftrat ein sera góður sangari og saxofon-leikari, og hevur haraftrat givið út eina solo-fløgu.

Sangskeiðið endar við eini konsert í ítróttarhøllini á Skála komandi leygardag.

**sb.**

## Svimjihøllin í Klaksvík vaksandi undirtøku

Eftir at stóra umbyggingin av Klaksvíkar Svimjihøll var liðug, kunnu starvsfólkini nú við gleði ásanna, at henda íløgan – serliga tann nýggja økan - var hent.

Síðani høllin lat upp av nýggjum hevur eitt metstórt tal av fólki vitjað svimjihøllina, og hetta fær nú leiðsluna til at víðka um tilboðið hjá teimum ídnu svimjarunum í Norðoyggjum.

Fyrsta broytingin er, at nú er opið bæði fyri vaksnum og børnum eftir kl. 18 og at høllin verður opin ein tíma longur sunnudagar. Fyrr varð stongd kl. 16, men nú er hetta broytt til kl. 17.

Seinasta vetur var serstøk svimjing fyri kvinnur. Hetta tiltakið eydnaðist eisini so mikið væl, at tað verður endurtikið hvørt mánakvøld í vetur.

Hinvegin kann staðfestast, at minni og minni undirtøka hevur verið fyri at svimja tíðliga mikumorgun.

- Hóast vitjunartalið er lágt mikumorgun, hava vit valt at geva hesum ein møguleika aftrat. Tað er hóast alt mong, sum gleðast um henda møguleikan, verður sagt.

**sb.**